## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:** Hvassur vindur ella skrið av útsynningi og ælingur, seinnapartin nakað minni vindur av vestri og sólglottar, men framvegis okkurt ælið. Hitin millum 12 og 15 stig.




**Veðrið hósdagin:** Gul til stívt andøvsgul av vestri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 13 og 16 stig.




**Veðrið fríggjadagin:** Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørki í støðum. Hitin millum 15 og 18 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:** Leygardagin andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi og yvirhøvur turt, men sunnudagin veksur hann vindin upp í hvassan vind av suðri og regn. Hitin millum 12 og 16 stig.

DAGSINS FØROYINGUR

# »Mær dámar øgiliga væl og eg stórtrívist«

**Jógvan Páll Kristiansen, Norðskáli, er 20 ára gamal og er júst byrjaður í læru sum timburmaður, og hann stórtrívist á nýggja arbeiðsplássinum**

*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*



**Hvussu longi hevur tú verið í læru?**

- Tað er á leið fýra vikur síðani, so eg eri nýggjur í fakinum enn. Áðrenn tað sigldi eg í eitt hálvt ár, so hetta er als ikki tað sama.

**Hvat dámar tær at læra?**

- Mær dámar øgiliga væl og eg stórtrívist. Starvsfelagarnir eru stak fittir og tað er altíð okkurt at gera, so tað er ófórt. Hinvegin er tað ikki lætt at fara frá eini góðari løn, og til eina lærlingaløn, men tað er tað vert.

**Hvat tekst tú við í frítíðini?**

- Eg havi vant judo í nógv ár, og fari at taka venjingina upp aftur nú so spakuliga, eftir ein drúgvan og góðan vetrarsteðg. Vónandi taki eg mær um reiggj og venji miðvíst, tí málið er at sleppa við á oyggjaleikirnar, har judo aftur er sloppið upp í part.

**Hevur tað týdning, at judo er við aftur á oyggjaleikunum?**

- Ja, tað hevur nógv at siga. Hetta er ein gularót til allar judarar, sum vit eiga at venja fram ímóti. Og um vit ætla at menna okkum sum judarar í Føroyum, so hava kappingar sum tær á oyggjaleikunum stóran týdning. Hinar altjóða kappingarnar, vit annars luttaka í, eru á nógv hægri støði, og har hava vit lítlan og ongan kjans at gera okkum galdandi.

**Ert tú ítrottaáhugaður annars?**

- Nú búgvi eg við Norðskála, so eg kann ikki annað enn fylgja við EB/Streymi. Vit hava ikki ligið fremstir fyrr, so tað er øgiliga spennandi at fylgja við í løtuni. Vónandi vinna vit seinasta dystin áðrenn steðgin, sum verður í annaðkvøld á Mølini móti ÍF.

**Hvørjum vilt tú heilsa?**

- Eg kundi gott hugsa mær at heilsa øllum, eg kenni, so at ongin verður sviðusoð. Og so vil eg eisini senda vinmonnunum við Norðskála eina serliga heilsan.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -- |
| Nuuk | 13 |
| Qaqortoq | 9 |
| Ammassalik | 4 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 9 |
| Seyðisfjørður | 6 |
| Tórshavn | 11 |
| Lerwick | 13 |
| Aberdeen | 16 |
| London | 22 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 16 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 26 |
| Keypmannah. | 21 |
| Helsinki | 26 |
| Moskva | 28 |
| Berlin | 22 |
| Warzawa | 31 |
| Kiev | 26 |
| Bukarest | 27 |
| Paris | 23 |
| Madrid | 33 |
| Róm | 26 |
| Malorca | 29 |
| Athen | 27 |
| Malta | 29 |
| Tunis | 30 |
| Beijing | 25 |
| New Dehli | 27 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 14 |
| New York | 27 |
| Miami | 28 |
| Los Angeles | 25 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 29 |
| La Paz | 11 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 16 |

### LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 1005 hPa. skamt sunnan fyri Føroyar fer eystureftir og grynnist. Eitt annað lágtrýst, 978 hPa. eystan fyri Hvarvið fer móti Íslandi og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum seint týskvøldið.




**Í dag:**
Lágtrýstið eystan fyri Ísland fer eystureftir og hevur nógvan vind við sær á okkara leiðum.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 8/7 kl. 06⁰⁰– 9/7. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 10,7°
Minsti hiti máldur í juli: 0,4° - Mesti hiti máldur í juli: 20,2°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 0 mm – mált frá 6/7 kl. 06⁰⁰– 9/7 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í juli: 22,3 mm







## VESTFALLSKYRRINDI

13. juli — Mánin næstur jørðini

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 11. Juli | 07.33 | 20.00 | 06.33 | 19.00 | 06.48 | 19.15 | 09.33 | 22.00 | 10.33 | 23.00 | 05.48 | 18.15 | 04.48 | 17.15 | 07.48 | 20.15 | 08.48 | 21.15 | 07.18 | 19.45 | 08.33 | 21.00 |
| 12. Juli | 08.27 | 20.52 | 07.27 | 19.52 | 07.42 | 20.07 | 10.27 | 22.52 | 11.27 | 23.52 | 06.42 | 19.07 | 05.42 | 18.07 | 08.42 | 21.07 | 09.42 | 22.07 | 08.12 | 20.37 | 09.27 | 21.52 |
| 13. Juli | 09.18 | 21.42 | 08.18 | 20.42 | 08.33 | 20.57 | 11.18 | 23.42 | - | 12.18 | 07.33 | 19.57 | 06.33 | 18.57 | 09.33 | 21.57 | 10.33 | 22.57 | 09.03 | 21.27 | 10.18 | 22.42 |
| 14. Juli | 10.07 | 22.30 | 09.07 | 21.30 | 09.22 | 21.45 | - | 12.07 | 00.42 | 13.07 | 08.22 | 20.45 | 07.22 | 19.45 | 10.22 | 22.45 | 11.22 | 23.45 | 09.52 | 22.15 | 11.07 | 23.30 |
| 15. Juli | 10.54 | 23.16 | 09.54 | 22.16 | 10.09 | 22.31 | 00.30 | 12.54 | 01.30 | 13.54 | 09.09 | 21.31 | 08.09 | 20.31 | 11.09 | 23.31 | - | 12.09 | 10.39 | 23.01 | 11.54 | - |

Kelda. Álmanakkin 2006

5 707265 100036 >